# Foreldur læra børnini at roykja

**Kanning millum skúlabørn í Klaksvík vísir, at ringu roykivanarnir hjá børnum ofta koma heimanífrá. Størsti parturin av skúlabørnunum, sum eru farin at roykja, liva dagliga við tubbaksroyki í heiminum**



*Roykfríu flokkarnir í Norðoyggjum vórðu heiðraðir við skreytblaði og vinningum*
*Mynd: Dávur Winther*

Í 2004 setti heilsunevndin hjá Klaksvíkar kommunu saman við skúlunum í Klaksvík sær eitt høgt mál: Ongi børn, sum eru fødd eftir ár 2000 skulu roykja í skúlaárunum.

Kanska órealestiskt, men sum tikið verður til: "um vit sikta eftir mars, so eydnast kanska at lenda á mánanum".

Skúlanir í Klaksvík hava seinastu árini havt serligt tubbakstiltak, har sjóneykan verður sett á ósunna og vandamikla tubbaksroykin. Fríggjadagin vóru øll børn í 6. til 9. flokk í Norðoyggjum savnað til hetta árliga tiltakið í KFUM & K.

Ragnhild Ellingsgaard var enn einaferð sera væl uppløgd sum frásøgufólk, og eitt tað fyrsta á skránni var ein heilsan frá løgmanni til ungdómin. Løgmaður er ein sera upptikin maður, so hann var ikki til staðar í salinum, men telefonupptøka varð spæld umvegis hátalarnar, ímeðan myndir av løgmanni vóru varpaðar upp á stórskíggja.

Eftir løgmann kom ungi altjóða talvmeistarin Helgi Dam Ziska á pallin. Helgi skuldi telva eitt fjøltalv í móti tveimum teimum sterkastu næmingunum, Herborg Hansen og Einari Gregersen og formanninum í heilsunevndini Rana Nolsøe. Eftir stuttari tíð hevði hann vunnið á teimum øllum. Hann vísti á, at hann roykir ikki, tí hann heldur tað er sera "ófeitt" og vildi tubbakstrongdin vildi órógvað hann í telvingini, sum krevur fulkomna konsentratión.



*Helgi Dam Ziska er framúr telvari, og hann segði, at tað kom als ikki upp á tal hjá honum at roykja, tí so kundi hann ikki konsentrera seg um drúgvu talvini*

### Dálkað inniluft í Føroyum

Lynn Reveal greiddi frá kanningum, sum eru gjørdar av inniluft í Føroyum. Føroyar hava nógv at læra av londum sum Írland, Svøríki, Italia, Spania og o.ø., sum hava tikið stig til at banna royking innandura á øllum almennum støðum – tað vil siga matstovum, dansihølum, kaffistovum og aðrastaðni.

WHO hevur sett ein standard fyri reina inniluft, sum er 10 mg av bitlum/m3. Í Føroyum vóru í miðal 163 mg av bitlum/m3. Har ringast stóð til var upp í 1600 mg av bitlum/m3! So her vóru tøl, sum veruliga talaðu. Tað eydnaðist Lynn væl at leggja hetta fram, ímeðan næmingarnir sótu hugtiknir og lurtaðu.

### Røddin sum vann á tubbakinum

Hanus G. Johansen stóð fyri tónleikinum í ár. Maðurin við sterku, eyðkendu røddini er sera vælumtóktir hjá teimum ungu. Hanus greiddi frá, at hann byrjaði sum ungur at roykja, men megnaði at steðga í tøkum tíma fyrst í nítiárunum. Hann segði, at um hann ikki varð hildin uppat at roykja, so hann ikki kunnað sungið í dag.

Roykurin hevur so keðiliga ávirkan á røddina hjá Hanusi, at hann í dag ikki kann framføra, har ið roykt verður. Roykurin setur seg á stemmubondini og hann gerst trongur og megnar ikki at stýra røddini sum hann vil. So um Hanus skal framføra, so krevur hann reina inniluft.

### Vinnulívið slóðar fyri

Tvey stór feløg í Føroyum vóru eisini við til tiltakið og kunnaðu um, hvussu tey hava skipað teirra roykipolitikk. Pól Sundskarð frá Føroya Tele greiddi frá, at longu í 2000 bleiv Føroya Tele í Klaksvík roykfrítt. Síðani var tátturin spakuliga tikin upp í restina av landinum og tá ið Klingran varð tikin í brúk í 2003, var tað sjálvsagt roykfrítt umhvørvi. Roykibannið umfatar eisini allar bilar hjá Føroya Tele.

Shell hevur eisini havt ein tubbakspolitikk, men fríggjadagin kunngjørdi leiðarin í Norðoyggjum, Niclas Heri Jákupsson, at 1. apríl verður roykipolitikkurin hjá Shell herdur til at umfata øll matrikul og allar bilarnar.

### Kanningin

Eitt hæddarpunkt hvørt ár er afturvendandi kanningin av roykivanunum hjá skúlabørnunum. Hon vísti, at flestu bygdaskúlarnir í Norðoyggjum eru roykfríir, meðan skúlarnir Klaksvík høvdu bert tríggjar roykfríar flokkar. Men í fleiri flokkum eru tað kortini bert fáir næmingar, sum gera tað, at flokkurin ikki er roykfríur.

Tá ið átakið byrjaði í 2004, vístu tølini, at í Skúlanum á Ziskatrøð royktu 25%, og í Ósáskúlanum 33% í so máta stendur nógv betri til í dag, tí nú roykja 15% (11% 2006) í Ziskatrøð, meðan 8% (7% í 2006) roykja í Ósáskúlanum.

Hetta er ein lítil øking í mun til í fjør, men tað er sera skjótt, at hesi tølini kunnu sveiggja, tí tey eru so smá. Um hugt verður at kynsbýtinum, vísir kanningin, at tað eru fleiri gentur enn dreingir, sum roykja.

Eisini sæst týðuliga, at tað er samsvar ímillum, um tað familjan roykir heima hjá børnum. Av teimum, ið hava fólk, ið roykja heima, roykja 37 næmingar. Av teimum, ið ikki hava roykjarar við hús, roykja bert 10 næmingar. So tað ber til at siga, at tað verður ongin roykfríur skúli uttan roykfrí heim. Har roykt verður heima hjá børnunum, er tað mamman, sum roykir mest.

### Roykafríir flokkar heiðraðir

Eftir kanningina vórðu roykfríu flokkarnir heiðraðir við skreytblaðið og vinningum frá Føroya Tele og Shell. Sum nakað nýtt hevur vinnulívið eisini givið teimum roykfríu flokkum ans og vildu stuðla øllum næmingunum í roykfríu flokkunum. Hetta var gjørt við at Føroya Tele lat teletíðarkort og Shell bjóðaði børnunum í biograf í Atlantis við popkorn og tí, sum tilhoyrir.

Annars vilja tey, sum skipa fyri tubbakstiltakinum í Klaksvík, staðiliga heita á Føroya løgting um at verða ein fyrimynd fyri ungdómin og bera so í bandi, at nýggja stásiliga løgtingshúsið, sum øll eiga, verður roykfrítt.

# Móttøka á Tangavirkinum



*Mortan og Bent Mortensen eru 2. og 3. ættarlið á Tangavirkinum. Her heilsa teir uppá Johannes Mortensen, bróður Palla Mortensen – Argja Palla, ið grundlegði virkið fyri 75 árum síðani. Johannes var fyrsti lærlingur í smiðjuni hjá Argja Palla*

*Mynd: Finn Johannessen*

**Fríggjadagin hevði Tangavirkið í Vági móttøku, har viðskiftafólk og onnur nýttu høvið at støkka inn á gólvið, nú virkið er farið um tey 75 árini**

MÓTTØKA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Heilt nógv fólk stukku inn á gólvið, tá Tangavirkið í Vági hevði almenna móttøku fríggjadagin, í samband við, at virkið nú hevur 75 ár á baki.

Og tað lá væl fyri at støkka inn á gólvið til ein kaffimunn og eitt prát, tí gólvið í virkishøllini var nevniliga ruddað og klárgjørt til móttøkuna, og ístaðin fyri stál og maskinur og virkisfúsar smiðir, beyð gólvið nú vældekkað kaffiborð við øllum góðum til bæði stór og smá.

Nógv fólk úr allari Suðuroynni heilsaði eigarum og starvsfólki á stóra degnum, og enntá onkur kom norðaneftir. M.a. Johannes Mortensen av Argjum, ið nú er komin væl til árs. Johannes er bróður Palla Mortensen, Argja Palla, ið grundlegði virkið fyri 75 árum síðani, og nýtti hann høvið at heilsa eftirkomarunum hjá bróðuri sínum, ið hava ført virkið víðari.

Fyri mognum árum síðani var Johannes Mortensen eisini fyrsti lærlingur í smiðjuni hjá Argja Palla.

Bent og Mortan Mortensen eru 2. og 3. ættarlið og hevur virkið klárað øll hesi 75 árini, hóast tíðir hava skift, og havt aldudalar við sær.